**Útisetin:** Martin Mouritsen, Keypmannahavn

# Helt ólavsøku niðri og heima

*Fert tú á ólavsøku?*

– Um eg fari á ólavsøku í ár? Satt at siga, veit eg ikki enn, men tað kundi hent seg. Nú er tað so, at eg eri limur í ólavsøkubólkinum, tí veit eg ikki rættiliga, hvar eg endi – á Bryggjuni í Keypmannahavn ella í Havn.

Martin Mouritsen, vinnulívsráðgevi í Keypmannahavn, er sum sagt eitt sindur í iva um, hvar hann hátíðarheldur ólavsøkuna í ár. So løgið tað kann ljóða, helt hann ólavsøku í fjør bæði í Danmark og í Føroyum. Ólavsøkuaftan var hildin á Bryggjuni, har hann hjálpti til við søluni av mati og drekka í einum tjaldi. Dagin eftir setti hann seg í flogfarið hjá Atlantic Airways, og á náttúrða ólavsøkudag var hann í Havn.

Hann legði lunnar undir kvøldið í Havn við at vitja »Einglabarrina« á Hotel Hafnia. Síðani spákaði hann sær ein túr oman og niðan eftir havnargøtum. Eina løtu var hann í Klubbanum, so aftur út á gøtuna, har hann hitti so nógvar vinir og kenningar, at hann ikki var heima fyrr enn klokkan sjey á morgni.

– Í grundini er hetta fyrstu ferð, eg veruliga havi verið á ólavsøku. Tá ið eg var búsitandi í Føroyum í 70-unum og 80-unum, hevði eg eitt spælistað, og hetta hevði við sær, at eg arbeiddi frá morgni til myrkurs, tá ið ólavsøka var. Tí er tað sera stuttligt at vera á ólavsøku, og hvør veit, kanska verður hon aftur í ár hildin í báðum støðum, sigur Martin Mouritsen, sum heldur, at jú eldri hann gerst, tess minni týdning hevur kappróðurin og fótbólturin.

– Men eg haldi enn við Havnarbátinum og B36 – hóast restin av familjuni eru trúgvir HB-fjepparar!, sigur Martin Mouritsen avgjørdur.

*Tekstur: Símun úr Konoy*




*Martin Mouritsen, sum býr í Keypmannahavn, sigur, at tað ikki er óhugsandi at hann aftur í ár heldur ólavsøku bæði í Keypmannahavn og í Havn*





Rúsdrekkasøla Landsins ynskir øllum føroyingum eina góða ólavsøku

Rúsdrekkasøla Landsins

Dygd og ábyrgd